# BARNAVÓN

(*Lag: Jeg en gård mig bygge vil*)



Eg ein garð mær byggja vil,
hvanngarður skal hoyra til,
víður bøur, síðar eingir,
tippi, smálomb innisteingir,
fyl og kálvar, heimaær,
hoyra til mín bóndagarð.

Hjallar, hoygarður og fjós,
hanin gelur uppá rós,
høsn og dunnur verpa, breggja,
fjálgt skal verða innanveggja,
tjørað hús og tøkt við flag,
hurðar, vindøg blá – sig tað.

Tætt við er eitt lítið gil,
har eg sá ein djúpan hyl,
hagar leiði eg kúnna at drekka,
tá í vestri sól man søkka,
seti hana so á bás –
fyri úthurðina lás.

*J. H. O. Djurhuus*

*Yrkingin stavar úr yrkingarsavninum "J. H. O. Djurhuus Yrkingar 1898-1948" frá 1988.*
*Barnavón stóð fyrstu ferð á prenti í Dimmalætting í 1947. J. H. O. Djurhuus týddi/umskrivaði tekstin eftir Alice Tegnérs: Livets saga (Liten stump jeg sjunga vill): Litet bo jag sätta vill...Sí Elias Sahlstedt: Visa*
*Myndina av garðinum tók eg ein góðveðursdag uppi í Hoyvík og gásafamiljuna møtti eg úti í Hesti*

